## Nilfisk spælir á Skarv

Íslendski rokk- og punkbólkurin Nilfisk fer leygarkvøldið aftur á pallin á Skarv í Keypmannahavn.

Nilfisk eru 4 mans, sum allir eru undir 20 ár. Teir byrjaðu at spæla saman í 2003 og eru teir serliga kendir fyri at teir hava hitað upp fyri heimskenda bólkin Foo Fighters, sum høvdu konsert í Íslandi fyri fáum árum síðani.

Nilfisk hevur spælt á Skarv í fjør, og tá vóru væl av íslendingum og vitjaðu Skarvin. Bólkurin hevur givið eina fløgu út og eina stakfløgu. Á Skarv siga tey, at tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at fáa íslendskar tónleikarir at spæla á Skarv við jøvnum millumbili.

Meira á: www.skarv.info




# Garrvillir íslendskir skemtipunkarar á G!

**Tá Dr. Spock fer á pallin á ársins G!Festivali, verður uttan iva talan um nakað av tí ørastu, og villasta, ið hevur vitjað Gøtusand. Punk/rokkararnir hava gjørt villar pallframførslur sítt vørumerki**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Mynd: Tá Dr. Spock fer á pall er talan um eitt freakshow í orðsins besta týdningi*
*Mynd: Iceland Airwaves*

Nýggjasta navnið á G! skránni er íslendski punk/ rokkbólkurin Dr. Spock. Tað er trupult ikki at samanbera Dr. Spock við føroyska bólkin 200. Báðir bólkar framføra sín heilt egna punkkenda rokk, við skemtiligum tekstum. Báðir bólkar vóru undirgrundsbólkar í fleiri ár og eru síðan vorðnir stór nøvn á heimliga tónleikapallinum, báðir bólkar hava vakt áhuga uttanlands og júst eins og 200 vann heiðurin besti bólkur á Planet Awards í fjør, so vann Dr. Spock heiðurin besti konsertbólkur á íslendsku tónleikaheiðurslønunum hjá XFM útvarpsstøðini. Hesa heiðursløn fekk bólkurin ikki minst orsakað av sínum garrvillu pallframførslum.

Dr. Spock var stovnaður stutt fyri ártúndskiftið við hugsjónini um, at skapa svakt skemtiligt rock'n'roll framført við svøkum pallframførslum.

### HAM oddamaður

Fyrstu árini spældi bólkurin konsertir av og á, men var ikki serliga virkin. Tað var ikki fyrr enn, bólkurin varð biðin um at gera eitt lag til filmin Óskabörn Þjóðarinnar, at verulig gongd kom í. Kendi íslendski rokksangarin Óttarr Proppe úr legendariska rokkbólkinum HAM, spældi høvuðsleiklutin í filminum, og Dr. Spock bað tí hann um at syngja á lagnum. Proppe og bólkurin vóru so nøgdir við samstarvið, at hann fór upp í bólkin. Luttøka á Iceland Airwaves 2004 gav veruliga úrslit. Stóra íslendska plátufelagið Smekkleysa var umboða á konsertini, og tónleikurin og frálíka móttøkan hjá áskoðarunum gjørdi sítt til, at Smekkleysa bjóðaði bólkinum útgávusáttmála.

### Dr. Phil gjørdi bólkin kendan

Í góðum punkstíli varð fyrsta fløgan, Dr. Phil, spæld inn uppá 20 tímar, har bólkurin spældi øll løgini beinleiðis inn í upptøkuhølinum. Bæði ummælarar og plátukeyparar elskaðu Dr. Phil, og bólkurin gjørdist millum kendu bólkarnar í Íslandi.

Hetta gav Dr. Spock nógvar konsertir, bæði á festivalum, smáum og stórum konsertstøðum og sum upphiting fyri Alice Cooper og Iggy Pop & the Stooges í Íslandi. Ein av teimum mest forkunnugu framførslunum var í einum íslendskum fongsli.

Dr. Spock hevur spælt nakað kring Norðurlond og í USA. Bólkurin hevur millum annað luttikið á risastóra ídnaðarfestivalinum South by Southwest í Austin, Texas. Eisini hevur Dr. Spock spælt á stóru ídnaðarmessuni Eurosonic í Hollandi.

Dr. Spock hevur eisini samstarva við Mugison, ið vitjaði í G! í fjør, Hetta var í sambandi við tónleik til íslendskan krimi filmin Myrin

### Størri enn nakrantíð

Í løtuni er Dr. Spock størri enn nakrantíð áður í heimlandinum. Bólkurin hevur herfyri givið EP-fløguna The Incredible Tooth of Dr. Zoega, og fyrsta lagið Skitapakk, lá seks vikur ovast á almenna hittlistanum í Íslandi. Arbeitt verður við eini komandi útgávu. Men tíð er altso sett av til eina vitjan á Gøtusandi. Ein vitjan, ið møguliga kann fáa Gøtusand at lyfta seg. Á G!Festivalinum eru tey spent, í tíðindaskrivið skrivar G! millum annað: "Tú gekst kanska og helt, at tú visti, hvat rokkar? Vell, spock you!! Gulir uppvaskihandskar og útspent vomb - Tað rokkar! Ivast tú? So kenn teg raktan, tá Dr. Spock fara á pallin við whisky í hond og geyla "skíta pakk" yvir fjøldina. Hetta er løtan, tá rock-elitan fær eitt íslendskt punkspark eitt vist stað! Dr. Spock hevur tveir sangarar, annar í ljósareyðum spandexbuksum, hin við einari trongd at vísa fram ístrið rundan um nalvan. Dr. Spock hevur altíð uppvaskihandskar við sær á pall. Og Jack Daniels. Bass-spælarin vil helst vera í leopard-undirbuksum - og bara teimum. Dr. Spock er gallsvakt, hyperaktivt, ein heiður fyri smakkloysið - og nógv for stuttligt! Orð sum "freakshow" og "bizart" byrja kanska at runga í hugaheiminum hjá teimum flestu, og tað er eisini júst hesi lýsingarorð ummælarar hava givið hesum merkisverda og undirhaldandi bólki. Men hetta er meint í positivu merkingunum av orðunum, tí dr. Spock er veruliga undirhald fyri allar pengarnar, sum ikki á nakran hátt taka seg sjálvar ov hátíðarliga, men megna kollektivt at gyppa dyntil við sinum legandariskt grotesku og skammleysu liveframførslum.... Tónleikurin er eitt bland millum kabarett og heavymetal, millum Frank Zappa, Primus, Mike Patton, MC Hár og Troels Trier, kryddað við rukkulívi, tvætli og attitudu....Øs teg upp, flenn, vís búk - hvat tú vilt, men droppa hatta har við at standa og síggja kul út! Spock you!"

## Eyðun nærkast toppinum

Nýggja fløgan hjá Eyðun Nolsøe kom út fyri stuttum, og nú ger Eyðun um seg á 15 teimum bestu. Lagið Hvønn dag, kom hesa vikuna beint inn á øðrum pláss á almenna føroyska hittlistanum.

Einans Páll Finnur Páll og lagið Mín russiski vinur hevur fingið fleiri atkvøður enn Eyðun hesa vikuna. Páll Finnur Páll megna sostatt at standa fastir í ovastu rók enn eina viku. Listin er á tremur við føroyskum tónleiki. Løgini í sangskrivarakappingini hjá AME hava fingið lov at royna seg, og fleiri av hesum eru komin inn á listan. Lagið Drain Me hjá Rannvá Jacobsen og Angu liggur á fjórða plássi, beint frammanfyri vinnaralagið í kappingini Grát ei við Eivør.

Boys In A Band, ið vunnu hjørtuni á útlendsku gestunum á AME, hava eisini vunnið føroysk hjørtu, bólkurin hevur ikki færri enn tvey løg á listanum, Super Contagious á sjeynda plássi og Secrets To Conceal á áttanda. Lagið hjá Vespu við Jens L. Thomsen og øðrum, ið vann annað pláss í kappingini hjá AME, Fjøllini standa úti, er somuleiðis á listanum á tólvta plássi.

Sic hava ligið ovast á 15 teimum bestu við lagnum To Dare To Risk To Regret, men hesa vikuna er lagið dottið niður á níggjunda pláss.

